## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og sirm ella mjørki av og á, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 17 stig.

# Forvitnisligir summartónar hósdagin



**Tónleikafagnaðurin Summartónar,ið fevnir um alt landið, er í hæddini, og hósdagin er skráin áhugaverd**

SUMMARTÓNAR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tónleikafagnaðurin Summartónar heldur fram og hósdagin er konsert í Mullers Pakkhúsi klokkan 16:00 við Marselis Kvartettini. Fleiri verk eru á skránni, og eisini frumframførslur eru á skránni av verki eftir Edvard N. Debess og av verkinum Færgen på Taken – och andre minnesbilder från Farøerna, sum er verk eftir Ramon Anthin.

Í Fríðrikskirkjuni á Toftum er konsert klokkan 20 við Rebeccu Persson (sopran) og Birgittu Schnakenburg (klaver).

Ungmannafelagshúsið Virkið á Sandi er klokkan 20 karmur um tiltak við Carmen Flamenco, sum hava hugtikið kring oyggjarnar nú í nakrar dagar við dansi og tónleiki.

Klokkan 19:30 hósdagin er konsert í Norðurlandahúsinum við Tarira. Sunleif Rasmussen er kórleiðari.

Eisini Aldubáran er við á konsertini og Bernharður Wilkinson stjórnar. Aldubáran og Tarira hava eisini felags framførslu á konsertini av verki eftir Kára Bæk.

Sjónleikarhúsið er karmur um konsert klokkan 22:30. Tá leikar Athene Kvartettin og eisini fer Tjant, við Heðin Z. Davidsen á odda, á pallin. Á kránni er tónleikur eftir H. Z. Davidsen.

Men síðani fara bæði Tjant og Athene Kvartettin á pallin og hetta er session við Heðin Z Davidsen. Umframt Heðin, so eru Bjarki Meitil, bass, og Rógvi á Rógvu, trummur, við í Tjant.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 15 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 23 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 25 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 35 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 988 hPa. sunnan fyri Ísland stendur í stað og grynnist.



**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland grynnist framvegis og hitabrúgvin eystan fyri Føroyar fer vesturum Føroyar fríggjanáttina

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/07 kl. 06[00] – 02/07 06[00]. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juni: 0,4° - Mesti hiti máldur í juni: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/07 kl. 06[00] – 02/07 06[00].
Avfallið higartil í juni: 0 mm




Lesið
Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli — Mánin næstur jørðini
3. juli — Tendring
4. juli — Jørðin longst frá sólini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. juli | 6:28 | 19:00 | 5:28 | 18:00 | 5:43 | 18:15 | 8:28 | 21:00 | 9:28 | 22:00 | 4:43 | 17:15 | 3:43 | 16:15 | 6:43 | 19:15 | 7:43 | 20:15 | 6:13 | 18:45 | 7:28 | 20:00 |
| 3. juli | 7:31 | 20:02 | 6:31 | 19:02 | 6:46 | 19:17 | 9:31 | 22:02 | 10:31 | 23:02 | 5:46 | 18:17 | 4:46 | 17:17 | 7:46 | 20:17 | 8:46 | 21:17 | 7:16 | 19:47 | 8:31 | 21:02 |
| 4. juli | 8:31 | 21:00 | 7:31 | 20:00 | 7:46 | 20:15 | 10:31 | 23:00 | 11:31 | - | 6:46 | 19:15 | 5:46 | 18:15 | 8:46 | 21:15 | 9:46 | 22:15 | 8:16 | 20:45 | 9:31 | 22:00 |
| 5. juli | 9:26 | 21:52 | 8:26 | 20:52 | 8:41 | 21:07 | 11:26 | 23:52 | 0:00 | 12:26 | 7:41 | 20:07 | 6:41 | 19:07 | 9:41 | 22:07 | 10:41 | 23:07 | 9:11 | 21:37 | 10:26 | 22:52 |
| 6. juli | 10:16 | 22:40 | 9:16 | 21:40 | 9:31 | 21:55 | - | 12:16 | 0:52 | 13:16 | 8:31 | 20:55 | 7:31 | 19:55 | 10:31 | 22:55 | 11:31 | 23:55 | 10:01 | 22:25 | 11:16 | 23:40 |